## Nýggjur Strandferðslu-stjóri er settur

Bogi Mortensen er settur í starv sum stjóri á Strandfaraskipum Landsins. Tað hevur Johan Dahl, landsstýrismaður við vinnumálum, gjørt av í dag. Bogi Mortensen skal avloysa Dánjal Andreasen, sum fer úr starvinum 1. februar. Bogi Mortensen er 51 ára gamal og býr í Vági. Hann er útbúgvin sum HA og hevur drúgvar leiðsluroyndir, m. a. frá fiskaframleiðslu og reiðarívirksemi. Bogi Mortensen starvast í løtuni sum leiðari á samferðsludeildini hjá Strandfaraskipum Landsins.



## Tangaskip skulu sigla við segli

Nakrir granskarar á Dyddansk Universitet arbeiða við at gera ein sjálvstýrara, sum skal gera tað møguligt hjá skipum at brúka vindorkuna at sigla og á tann hátt spara olju. Jerome Jeuffrey, lektari, sum stendur á odda fyri ætlanini, sigur við Nyhedsmagasinet Ingeniøren, at málið er at finna eina skipan, sum fer at gera tað óneyðugt hjá teimum stóru tangaskipunum at brúka olju. Hann vísir á, at í 1800-talinum bar tað væl til at gera seglskip, sum vóru meiri enn 100 metrar long, so tað eigur eisini at bera til í dag, heldur hann.

# Fleiri stormskaðar um vikuskiftið

**Løgreglan fekk sunnudagin fleiri fráboðanir um stormskaðar kring landið. Húsatekjur og klædningar rivu, onkur bátur hevði slitið seg leysan og uppgangur gjørdi stórskaða í Nólsoy**

ILLVEÐUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Stormur herjaði um landið sunnunáttina og sunnudagin. Vindferðin var upp í stormstyrki, og ættin var útsynningur. Hetta førdi við sær at fleiri smærri skaðar vóru kring landið.

Klokkan 6.50 fekk løgreglan fráboðan um at tveir bátar høvdu slitið seg leysar í Skopun. Seinni á degnum fekk løgreglan enn eina fráboðan úr Skopun, og tá vóru tað skorsteinurin og húsatekjan á Samljóð í Skopun, sum vóru rivnaði av vindinum. Hetta var stutt eftir klokkan 14.

Í Klaksvík vóru eisini fráboðanir um skaðar, og um klokkan 9.30 fekk løgreglan har fráboðan um, at ein bátur hevði slitið seg leysan, og at ein húsaklædningur var rivnaður.

Ein húsaklædningur reiv eisini í Syðrugøtu, um framt at ein vindskeið eisini varð farið í Vestmanna.

Klokkan 13.30 hevði takið á einum fjósi í Oyndarfirði rivið seg leyst, og tá vóru eisini boð send løgregluni.

Ein tekja í Gongini í Havn reiv eisini, sjálvt um har er rættiliga gott fyri vindi. Hann var lágur, og tískil tók vindurin rættiliga hart har, og tað gjørdi so at ein tekja reiv.

Á Argjum vóru eisini skaðar, onkur húsatekja, sum reiv, umframt ein kampingvong, ið hevði flutt seg eitt sindur, og sum mátti surrast.

Tilsamans fekk løgreglan 14 fráboðanir um skaðar av vindi sunnudagin, men sum tað sæst omanfyri, var talan mest um smærri skaðar.

### Brimskaðar í Nólsoy

Í Nólsoy var rættiliga nógvur uppgangur, og hetta elvdi eisini til stóran skaða.



*Í Nólsoy er mest sum allur vegurin skolaður burtur*
*Mynd: Nicolaj Falck*



*Sløkkiliðið festir rivnu tekjuna*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

- Tá vit komu á staðið um sjeytíðina í morgun breyt framvegis niðan til húsini, so vit máttu bara sum fræggast negla fyri klædningin, sum eftir var. Vit vórðu skolaðir undir høvd, og ein maður varð tikin einar 50 metrar við briminum heim í bygdina, sigur Nicolaj Falck, sløkkiliðsleiðari í Nólsoy.

Hann greiðir frá, at eini sethús hava fingið skaða. Klædningur er rivin, og ein hurð í eina garasju skolað inn.

- Eg veit ikki, um tað er brimið ella vindur, sum hava rivið klædningin, ella kanska bæði. Men fleiri amboð, sum stóðu í garasjuni eru skolað langt heim í bygdina, greiðir Nicolaj Falck frá.

Umframt húsini, so er stórur skaði á vegin, sum at kalla er skolaður burtur. Eisini reiv klædningur á einum øðrum húsum, men har fingu teir neglt fyri, áðrenn skaðin gjørdist álvarsligur.

Nicolaj Falck greiðir frá, at nakrir bátar í bátahylinum eisini hava fingið smærri skaðar.

- Síðani nýggi brimgarðurin varð gjørdu út frá Kirkjutanga er uppgangurin vorðin størri, tí sjógvurin sleppur ikki burturaftur, sigur Nicolaj Falck.

Aftur hesaferð tilfar skolað inn á fótbóltsvøllin, men Nicolaj Falck heldur ikki, at hann hevur fingið skaða.

- Har liggur eitt tunt lag yvir allan vøllin, sum vit mugu rudda burtur, sigur hann.

# Fimm fóru í felluna fríggjakvøldið

**Fríggjakvøldið var løgreglan úti við ferðmátaranum, og í alt vóru fimm sakir tað kvøldið. Tann, ið hevði stórstan skund, koyrdi heili 133 km/t. Leygarkvøldið vóru tríggjar sakir skrivaðar**

FERÐSLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Í alt átta sakir vórðu skrivaðar, tá løgreglan var úti við ferðmátaranum um vikuskifti*

Løgreglan var fríggja- og leygarkvøldið úti við ferðmátaranum, har teir kanna-aðu ferðsluna til og frá Havnini. Í alt vóru átta sakir skrivaðar og trý klipp givin. Eisini var onkur mistanki um rúsdrekkakoyring, men eingin varð tikin.

Fríggjakvøldið vóru fimm sakir skrivaðar, tá løgreglan var úti við ferðmátaranum. Tann, ið var máldur at koyra mest, varð máldur til heili 133 km/t, og gav tað frákenning av førararættinum á staðnum.

Fýra aðrir førarar vóru tiknir hetta kvøldið, men eingin av teimum fekk klipp.

Leygarkvøldið vóru løgreglumennirnir eisini úti við ferðmátaranum, og tá vóru tríggjar sakir skrivaðar. Ein varð tikin fyri at koyra 108 km/t, og tað gevur eitt klipp í kortið.

Eitt annað klipp var eisini givið hetta kvøldið, og tað var fyri ólógliga yvirhaling.

Ferðmátingarnar vórðu allar gjørdar á leiðini til og frá Havnini.

# Ólóglig parkering gevur høvuðbrýggj

**Næstan hvørt vikuskifti fær løgreglan fráboðanir um bilar, ið standa parkeraðir til ampa. Ofta er talan um óskrásettar bilar, og tað gevur eyka arbeiði til løgregluna**

FERÐSLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Hvørt vikuskifti fær løgreglan fleiri fráboðanir um óskrásettar bilar, ið standa parkeraðir til ampa á almennum vegi. Hetta vikuskiftið hava verið tríggjar fráboðanir um hetta, og tað er sæmbart vakthavandi regluliga at tað gevur løgregluni nógv eyka arbeiði.

- Tað ger, at vit mugu út at leita eftir eigaranum av bilinum, soleiðs at hann kann verða fluttur. Tað kemur eisini ofta fyri at bilarnir bara verða fluttir, og so verður rokningin send eigaranum. Men tað er næstan hvørt vikuskifti, at hetta elvir til eyka leitingararbeiði, greiðir vakthavandi á løgreglustøðini í Havn frá.

Óskrásettir bilar mugu ikki standa parkeraðir á almennum vegi, men tað kemur oftari og oftari fyri, verður greitt frá av løgreglustøðini í Havn.